# Skúlabørnini virða umhvørvið

**Skúlabørnini í Hósvík løgdu týskvøldið fram úrslitið av evnisviku, tey hava havt um umhvørvi.Tey halda, at tey vaksnu kundu farið betur um, og onkrar spískar viðmerkingar vóru eisini latnar av**

UMHVØRVI
*Edvard Joensen*

**Hósvík:** Tey hava havt evnisviku um umhvørvi, skúlabørnini í Hósvík. Á samkomu í skúlanum týskvøldið varð úrslitið lagt fram, og har vóru viðmerkingar til teir stóru hósvíkingarnar fyri ikki altíð at ganga nóg væl um.

Væl meira verður gjørt við at kunna um umhvørvið og vandan við at fara óvandaliga um tað, enn gjørt varð fyri bara nøkrum fáum árum síðan. Serliga gleðiligt er tað, at skúlarnir taka við, tí tá børnini læra álvaran í at halda umhvørvið reint, fara tey eisini at minnast tað, tá tey eru vaksin, sigur Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík, sum hevur verið við til at tikið stig til umhvørvisvikuna í Hósvíkar Skúla.

At børnini taka tað í álvara, var eingin ivi um, tá úrslitið varð lagt fram í skúlanum týskvøldið. Fleiri leikir, tey høvdu gjørt, uppsetingar av ymsum, tey høvdu savnað saman, og ein frálík ljósmyndarøð, sum vísti gongdina í verkætlanini, var nakað av tí, sum var at síggja.



*Ruddingarmaðurin er komin av sandinum og er í ferð við at skilja ruskið í ymsu posarnar, sum standa klárir at brúka*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Góð undirtøka

Skúlastovan er stúgvandi full hetta góðveðurskvøldið í juni. Eitt tekin um, at her eru bæði foreldur, ommur og onnur, sum hava áhuga í at síggja tað, børnini hava gjørt.

Tað byrjaði við eini frágreiðing frá fyrstalæraranum, áðrenn triðji flokkur slapp at spæla ein dukkuleik, tey høvdu gjørt um tað at dálka.

Tað var reingin ivi um, at tey halda, at tá tú fert ein túr í kioskina, eigur tað, sum blakað verður burtur, at koyrast í ruskílatið heldur enn á vegin, sum vit so ofta síggja, hóast stutt mangan er millum ruskíløtini.

Fyri stuttum hevur almennur ruddingardagur verið í Hósvík, og tað varð nevnt nakrar ferðir undir tiltakinum, at ivaleyst hevur onkunstaðni verið gingið í linligara lagi frá ruddingini hendan dagin, tí nógv rusk var at finna, eitt nú á sandinum, ikki meira enn eina viku eftir ruddingardagin.

Tó skal sigast, at tað meira enn so kann vera slíkt, sum rikið er upp á ferð suður ella norður gjøgnum Sundalagið.

Eins og smærru børnini høvdu sín dukkuleik, høvdu tey størru børnini eisini sínar leikir, sum allir greitt vístu til umhvørvistilvitan. Fleiri leikir heldur enn ein, umframt at tey endaðu við einum umhvørvissangi, tey sjálv høvdu gjørt.

Høvuðsleikurin var tann um, hvussu ruskið skal skiljast, har tey á sera einfaldan og viðkomandi hátt vildu læra hósvíkingar og annað gott fólk, sum saman var komið, hvussu ymiska ruskið skal flokkast.

Fýra næmingar, ílætnir teir tríggjar ruskposarnar, gráa, hvíta og grøna, eins og ein, sum latin var í ein kompostkassa, vórðu settir upp við talvuni, hagar ein ruddingarmaður so kom við eini trillubøru við ruski, hann hevði funnið á sandinum. Stutt sagt allan møguligan lort.

Tað gekk eitt sindur striltið hjá ruddaranum at finna røttu posarnar,at koyra í. Men við góðari hjálp frá posunum sjálvum, fekk hann at vita, hvat skuldi í hvønn posan, og at lívrunnið burturkast sum súreplaskrokkar og bananskøl kundu fara í kompostkassan. Tí, sum sagt varð: Av mold ert tú komin, og at mold skalt tú verða.

Soleiðis at fáa skorið út í papp, hvussu flokkast skal, átti eisini at fingið tey eldru, sum kanska ivast eitt sindur, at sæð, hvussu lætt tað í veruleikanum er at skilja rusk.

### Myndarøð

Tiltakið endaði við áhugaverdari ljósmyndarøð, sum vísti gongdina í evnisvikuni um umhvørvi.

Tey høvdu tikið myndir og sett saman á teldu, sum so aftur varð víst á skíggja í stovuni.

Og her var ymiskt, sum eigur at fáa fólk at hugsa seg um. Tí tey vóru bersøgin, hesi ungu fólkini, sum verið høvdu runt í bygdini og funnið slíkt, sum gipsað varð, tá almenni ruddingardagurin hevði verið stutt frammanundan.

Til dømis var ikki einki gjørt burtur úr, at onkur hevði grivið eitt gamalt jarvask úr einumhvørjum kjallara, niður. Hetta høvdu tey funnið, tí ikki var nóg væl tyrvt. Og tað hildu tey vera burturvið, soleiðis at royna at sneiða sær undan at rudda ordiliga.

Vaskið varð grivið uppaftur og víst fram í myndarøðini, og henda kann, at onkur í fjøldini kanska kendi seg eitt sindur raktan.

Vitjað hevur eisini verið ymsastaðni. Bæði í Norðurstreymoy og Norðureysturoy. Og sum vera man, er Vestmanna altíð á skránni, tá um umhvørvið ræður.

Eisini aðrar bygdir høvdu fingið vitjan av gløggu myndatakarunum úr Hosvík, og har varð víst á ymiskt. Bæði slíkt, teimum dámdi, og slíkt sum als ikki fall í góða jørð.

Einastøðani var viðmerkingin í myndatekstinum beinleiðis, at tað, sum víst varð, var ljótt. Stutt og kontant.

Vitjanin á endurvinningarstøðin hjá IRF í Leirvík hevði millum annað við sær, at tey fóru at endurvinna pappír úr gomlum avísum. Og tað hevði eftir tí at døma, sum víst varð fram, gingið rættiliga væl.

Børnini høvdu hugnað sær óført, skiltist aftan á tiltakið, og ikki er at ivast í, at tey eisini hava givið øðrum okkurt at hugsa um, næstu ferð, ruskspannin skal tømast.

## Við fullum musikki til London

**Ungdómsorkestrið hjá Musikskúlanum í Vágum er á konsertferð í London. Ætlanin er at halda fýra konsertir í heimsbýnum**

KONSERTFERÐ
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Saman við tveimum lærarum eru 24 næmingar, sum manna Ungdómsorkestrið hjá Musikskúlanum í Vágum, á konsertferð í London. Fýra konsertir verða hildnar á ferðini.

Martin Pollard, leiðari á musikskúlanum í Vágum, er ferðaleiðari, saman við Steve Foggin, sum stjórnar Orkestrinum. Teir eru báðir bretar, so valið var lætt, tá gerast skuldi av, hvar farast skuldi, sigur Martin Pollard.

Eisini hevði sera væleydnaða ferðin, Ungdómsorkestrið gjørdi til Íslands í fjør, hildið teimum væl til at gera enn eina uttanlandsferð at sýna, hvat tey duga, eins og at síggja og læra nakað nýtt, sigur hann.

Farið varð úr Føroyum mánadagin, og ferðast varð um Keypmannahavn til London, har tey fara at verða til til leyardagin, tá farið verður aftur til Keypmannahavnar, har steðgað verður eitt samdøgur, áðrenn komið verður aftur til Føroya.

Martin Pollard sigur, at hann metir tað sum eitt gott hugskot at gera ein slíkan túr við ungu næmingunum. Á tann hátt hava tey nakað at arbeiða fram ímóti, meðan vant verður allan veturin, eins og tey sleppa at síggja fremmandar mentanir, og sleppa at royna sín málførleika, sigur hann. Tey møta nýggjum vinum og fáa eina almenna upplæring av hesum, heldur musikskúlaleiðarin í Vágum.



*Ungdómsorkestrið í Vágum fór mánadagin við Maersk Air til Keypmannahavnar og haðani víðari til London, har orkestrið fer at hava fýra konsertir hesa vikuna*
*Mynd: Edvard Joensen*

*Jóannes Eidesgaard handaði vinningin á Gamla Apoteki týsdagin. Julianna tók í móti, meðan dóttirin, Gudrun, spent fylgir við*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



## Julianna sleppur við Norrønu

**Julianna Foldbo í Havn vann ferðina, sum Javnaðarflokkurin lutaði burtur í samband við, at til bar at senda spurnarbløð inn aftur til flokkin undan løgtingsvalinum**

VINNINGUR

Familjan Foldbo í Brøttubrekku í Havn vann millum 1.200 luttakarar lutakastið um ferðina, Javnaðarflokkurin lutaði burtur undan løgtingsvalinum. Týsdagin var 10 ára gamla Gudrun saman við mammuni, Julionnu, á Gamla Apoteki, har Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, handaði teimum vinningin.

Borgatstjóprin í Havn, Jan Christiansen, hevði undir neyvum eftirliti frá Vilhelmi Johannesen, løgtingsmanni, funnið fram til, at vinningurin varð funnin á reiðiligan hátt.

Vinningurin er ein bilpakki fyri tvey vaksin og tvey børn millum Tórshavn og Hanstholm við nýggju Norrønu, og Julianna Foldbo sigur, at tey fara t brúka vinningin komandi ár, tá skipið er komið.

*ej*



# Góðu tíðirnar halda ikki fram í allar ævir

**– Veiðiliðið eigur at fáa fríar ræsur at selja sín fong, har besti prísurin fæst, sigur Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Burtursæð frá eftirlønarskipanini fyri fiskimenn, er talan bert um smávegis reguleringar í sáttmálanum millum feløgini. Hesar koma ikki at kosta okkara limum tað stóra, sigur Jákup Sólstein*

Í formansfrágreiðing síni til aðalfundin hjá Føroya Reiðarafelag, nam Jákup Sólstein eisini við framtíðarvánirnar.

– Vit hava nú í fleiri ár upplivað so góðar tíðir, sum ongantíð áður. Tað er ikki sannlíkt at halda, at hetta altíð verður so.

Jákup vísti á, at ein munandi lækking hevur verið í feskfiskaprísunum seinasta hálva árið, og at henda lækking serliga hevur rakt prísin á toski.

Hann helt tað ikki vera sannlíkt, at henda lækking kann uppvigast við størri nøgdum av toski.

– Tí eigur dentur at verða lagdur á, at veiðiliðið fær fríar ræsur at selja sín fong, har besti prísurin fæst, segði Jákup Sólstein.

### Sáttmálin við FF

Formaðurin í reiðarafelagnum nam eisini við sáttmálan, sum felagið hevur gjørt við fiskimannafelagið.

– Tað nýggja í hesum sáttmála er, at vit eru gingnir við til eina eftirlønarskipan fyri fiskimenn.

Jákup segði, at reiðarafelagið undan avgerðini um eftirlønarskipanina hevði innanhýsisfundir við formenninar fyri allar veiðibólkar fyri at vita, hvat teir hildu um hetta.

– Her fingu vit heimild at fara undir hesa skipan, segði hann.

Jákup Sólstein segði, at í nýggja sáttmálanum millum feløgini eru annars bert smávegis reguleringar, sum ikki koma at kosta tað stóra.

## Vit taka tað róligt eftir norðoyastevnuna

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Sum skilst á stjóranum á Kósini, Adrian Dalsá, hevur ikki so nógv flakaarbeiði verið á virkinum í hesi vikuni, og tað passar kanska ikki so illa hjá klaksvíkingum, nú hetta er vikan beint eftir norðoyastevnu.

– Línuskipini vóru inni fyri stevnuna, og tann fiskurin er komin til høldar. Hjá upsabátunum roynist fiskiskapurin ikki so væl beint nú, og tí hava vit ikki fingið fatur á teimum stóru ráfiskanøgdunum í fyrru helvt av vikuni.

Nakað hevur tó verið av flakaarbeiði á Kósini hesa vikuna, og saltfiskaarbeiði er alla tíðina.

– So, vit taka tað bara eitt sindur róligt beint nú, sigur Adrian Dalsá.

Mikudagin dugdi hann ikki at meta um, hvussu seinnaparturin av vikuni fer at roynast, men Kósin liggur fram við, tá ið sølur eru.

Línuskipini eru júst farin útaftur, og tey koma ikki aftur hesa vikuna, um alt gongur sum ætlað.

– Tað er minni upsi á marknaðinum beint nú, og tað merkja vit eisini her norðuri, sigur Adrian Dalsá, stjóri á Kósini.


*Tað hevur ikki verið so nógv rokan á Kósini nú í vikuni eftir norðoyastevnu*

# Føroysk skip mistu 62.000 tons í ES-sjógvi

**– Tað dámar okkum lítið, at Ísland nú tengir okkara veiðimøguleikar í íslendskum sjógvi saman við svartkjaftinum.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Sum kunnugt, vóru seinastu sáttmálasamráðingarnar millum Føroyar og ES ógvuliga truplar, og komst hetta einans av spurninginum um svartkjaftin.

– Endin varð, at vit fingu onga sínámillum avtalu um svartkjaftin yvirhøvur, og tí mistu føroysk skip 62.000 tons av svartkjafti í ES-sjógvi, segði Jákup Sólstein á aðalfundi reiðarafelagsins.

Annars var ES-sáttmálin sum vant óbroyttur.

### Noreg og Ísland

Noregssáttmálin gjørdist á nøkulunda sama støði sum í 2001.

– Munurin er tó, at vit fyri 2002 hava goldið við meira makreli í mun til ein niðurskurð uppá 12.000 tons í svartkjafti.

Jákup vísti annars á, at norska línuveiðan undir Føroyum er á sama støði í nøgd, men er munandi skerd, tá ið ræður um hjáveiði av toski og hýsu.

Um sínámillum veiðirættindini hjá føroyingum og íslendingum, segði formaðurin í reiðarafelagnum, at Ísland nú tengir okkara veiðimøguleikar í íslendskum sjógvi saman við svartkjaftinum.

– Hetta er nýtt fyribrigdi, hvat botnfiskaveiði hjá línu- og snelluskipum viðvíkur, og okkum dámar sera illa hesa gongdina.

### Økir latin uppaftur

Jákup Sólstein segði annars, at reiðarafelagið saman við felagnum Línuskip hevur havt fund við íslendska fiskimálaráðharran.

– Her fingu vit tað burtur úr, at tey stongdu økini á Suðurlandinum partvís eru latin uppaftur.

Annars er nýggi fiskirættindasáttmálin millum Føroyar og Ísland á sama støði sum í 2001.


*Okkum dámar illa, at íslendingar teinga veiðimøguleikarnar í íslendskum sjógvi saman við svartkjaftin, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum*

## Betri pláss undir lúkunum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ametyst og Jaspis landaðu ávikavist í Saltangará og á Toftum mánadagin. Teir høvdu 1600-1700 kassar tilsamans ella eini 160.000-170.000 pund. Mesti parturin av veiðini var upsi.

Fiskavirking í Saltangará keypti upsan hjá báðum skipunum.

Síðsta fríggjadag landaðu eisini Safir og Smaragd til Fiskavirking í Saltangará; teir høvdu umleið 250.000 pund av upsa tilsamans.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at eini 80.000-100.000 pund av veiðini hjá Safir og Smaragd fóru til Vestmanna og eini 30.000 pund til Miðvágs. Restina arbeiddu tey í Saltangará.

### Betri pláss

Jason heldur, at fiskiskapurin hjá trolarunum er eitt sindur slakari nú.

– Tað er betri pláss í lastini hjá skipunum nú, enn tað hevur verið, tá ið tey koma aftur av túri. Skipini hava leingi verið full undir lúkurnar, men soleiðis er ikki beint nú, sigur Jason Johannesen.

Hann vónar, at onkur landing verður hósdagin, so fólk sleppa aftur til arbeiðis eftir steðgin, sum verður mikudagin, tá ið grundlógardagur er og hálvur frídagur.